# LISTASAVN FØROYA

## Ársfrágreiðing og roknskapur
## 2005

Listasavn Føroya - Gundadalsvegi 1 - Postsmogu 1141 - FO 110 Tórshavn - Føroyar
Telefon +298 313579 - Fax + 298 316679 - T-postur: info @ art.fo - www.art.fo

apr – 06

# Innihaldsyvirlit


Innihaldsyvirlit ........ 2
Ársfrágreiðing og roknskapur 2005 ........ 3
Alment ........ 3
Innsavnan ........ 3
Varðveitsla ........ 3
Gransking ........ 3
Miðling ........ 4
Framsýningar ........ 4
Skiftandi framsýningar ........ 4
Framsýningar uttanlands ........ 4
Grunnur til keyp av list ........ 4
Útbygging av Listasavni Føroya ........ 4
Starvsfólk ........ 5
Stuðul og fíggjarvánir ........ 5
Virkisgrundarlag og endamál ........ 6
Navnið á savninum ........ 6
Adressa, telefonnummar o.t. ........ 6
Savnsbygnaður ........ 6
Endamálið hjá Listasavni Føroya ........ 6
Samstarvsavtalur ........ 6
Innsavning, keyp og gávur ........ 7
Listasavnið ........ 7
Keypt, givin og latin í varðveitslu ........ 7
Keyp: ........ 7
Donatión - gáva: ........ 7
Savnið ........ 9
Útlánt listaverk ........ 9
Varðveiting og skráseting ........ 10
Skráseting ........ 10
Konservering ........ 10
Kunning ........ 11
Fasta framsýningin ........ 11
Upplatingartíðir – Opening hours ........ 11
Skiftandi framsýningar ........ 11
Vitjandi, rundvísingar og annað kunnandi virksemi ........ 12
Bygnaður, leiðsla og starvsfólk ........ 13
Stýrið ........ 13
Leiðslan ........ 13
Leys hjálparfólk ........ 13
Fígging og roknskapur ........ 14
Rakstrarroknskapur pr. 31. desember 2005 ........ 14
Fíggjarstøða pr 31. desember 2005 ........ 15
Notur til ársroknskapin 2005 ........ 17
Samanseting av tí almenna og sjálvseigandi ársroknskapinum 2005 ........ 18

# Ársfrágreiðing og roknskapur 2005

## Alment

Nú fyrsta árið hjá leiðsluni og nýggja stýrinum fyri Listasavn Føroya er lokið, vilja vit koma við hesari frágreiðing um støðuna og framtíðina á savninum.

Í februar 2005 varð Helgi Fossádal settur í starv sum savnsleiðari av táverandi stýri fyri Listasavn Føroya eftir einmæltum tilmæli frá Listafelag Føroya og Felagnum Føroysk Myndlistafólk. Savnsleiðarin er settur í eitt 5 ára tíðarskeið við fyrsta árinum sum royndarár.

1. apríl 2005 tók nýtt stýri fyri Listasavn Føroya við. Fyrsta árið er í stóran mun nýtt til at fáa skil á framsýningarnar, savnsverkini, bygningin (inniluft og trygdarviðurskifti), og fyrisitingina.

Starvsfólkastøðan er tann, at sama dag sum savnsleiðarin byrjaði 1. mars 2005, sjúkrameldaðu bæði starvsfólkini á savninum seg. Seinni fóru bæði starvsfólkini úr starvi. Vegna fráfaringarlønir hevur savnsleiðarin hetta fyrsta árið verið einsamallur um dagliga arbeiðið á savninum, tó við onkrum tímaløntum starvsfólki afturat sær.
Í næstum er ætlanin at seta tey leysu størvini á Listasavninum.

Í sambandi við tað kjak, sum verið hevur um stovnin, stýrið og leiðsluna, so er at viðmerkja, at Listasavn Føroya er sjálvsognarstovnur, og eru tað stýrið og leiðslan, sum hava ábyrgdina av, at stovnurin verður rikin eftir galdandi viðtøkum, og metir stýrið seg ikki at hava nakra grundgeving fyri at gera broyting í leiðsluni.

Stýrið og leiðslan hava hetta fyrsta árið sett sær sum mál at leggja lunnar undir leiðreglur á øllum økjum innan savnsarbeiðið, bæði tað fyrisitingarliga og listfrøðiliga, soleiðis at Listasavn Føroya verður á hædd við onnur líknandi listasøvn og verður ein væl virkandi stovnur.

Listasavnið hevur ikki havt nakra skrivliga mannagongd, men nú er ein gjørd fyri øll øki á stovninum, og verður hon endaliga samtykt í næstum.

Ein virkisætlan er gjørd fyri komandi árini fyri teir 5 grundarsteinarnar undir øllum listasavnsarbeiði:

## Innsavnan

Framhaldandi at innsavna føroyska nútíðarlist, ið verður mett at hava varandi virði fyri framtíðina, og aðra list við tí endamáli at gera eina so nágreiniliga og fullgjørda heildarmynd sum gjørligt av føroysku listasøguni.

Halda fram við skrásetingini av listaverkunum, ið er byrjað. Savnið hevur skyldu til at hava yvirlit yvir øll savnsverk og meta um, hvørjum standi tey eru í.

## Varðveitsla

Savnið hevur ábyrgd av at røkja listaverkini, so at tey altíð eru í so góðum standi, sum til ber. Konserveringsætlanin heldur áfram tey komandi árini, og 12 listaverk aftrat eru send til konserveringar á Fælleskonserveringen í Århus.

## Gransking

Við støði í savnsverkunum verður arbeitt við at skapa eitt granskingarumhvørvi. Arbeitt verður við at fáa samstarv við lærdar háskúlar her heima og í útlondum til gagns fyri føroysku listina. Bókaútgávur um føroyska list er ein sjálvsagdur partur av granskingini, ið savnið skipar fyri.

## Miðling

Skúlabørn, tað føroyska fólkið sum heild og ferðafólk eru málbólkarnir. Miðlingin kann gerast í sambandi við bókaútgávur, alnótina og framsýningar.
Ein ítøkilig skúlatænasta, ið skal geva íblástur og vegleiða lærarar, skal setast í verk. Samstarv við Føroya Skúlabókagrunn er byrjað.

## Framsýningar

### Fasta framsýningin

Fasta framsýningin skal sum vant vera umboðandi. Talan kann vera um broytandi uppheingingar, t.d. grundað á eina ávísa tematiska ella søguliga hending, sum ynskiligt er at lýsa, sum stóra Mikines-framsýningin er eitt gott dømi um.

### Skiftandi framsýningar

Føroysk og útlendsk list verða sýnd. Ein langtíðar framsýningarætlan verður gjørd. Talið av serframsýningum fækkast, so tað betur samsvarar við fíggjarliga og starvsfólkaliga grundarlagið.
Listasavnið hevur sera góð sambond við søvn og stovnar í útlondum. Tað, at Munch-savnið hevur góðtikið Listasavn Føroya at framsýna teirra list, hevur givið okkum sera góðar møguleikar til tílíkar altjóða framsýningar á Listasavni Føroya.

### Framsýningar uttanlands

Arbeitt verður við at útbyggja samband savnsins við onnur søvn og framsýningarstøð í útlondum fyri at skapa áhuga fyri føroyskari list. Savnið kann hjálpa til við framsýningum av føroyskari list í útlondum við at veita ráð og hugskot og at vera við í verkætlanum.Í komandi árum eigur kunning at verða ógvuliga høgt raðfest. LF skal miða eftir, at samband er millum kunning og aðrar uppgávur hjá savninum, gransking íroknað. Endamálið við framsýningum, kunningartilfari, rundvísingum, undirvísing, workshops, internet, fyrilestrum o.ø. er at geva og kunna um eina fjølbroytta og skjalprógvaða mynd av føroyskari list og listasøgu.

### Grunnur til keyp av list

Listasavnið hevur avmarkaða orku til at keypa list fyri. Tí verður arbeitt við at seta á stovn ein serstakan grunn undir Listasavninum til hetta endamálið. Fyri at fíggja henda grunnin er ætlanin at fáa til vega pening á hvørjum ári frá tí almenna. Áðrenn Listasavnið gjørdist sjálvsognarstovnur í 1989, var tað ein almennur stovnur undir Landsstýrinum, sum fekk eina árliga játtan á fíggjarlógini til at keypa føroyska list fyri. Hetta hevur verið bæði táverandi og núverandi Listasavninum til ómetaliga gagn og føroysku listasøguni til frama. Ein slíkur grunnur er alneyðugur, skal tjóðarsavn føroyinga framhaldandi vera við í kappingini um at keypa føroyska nútíðarlist og megna at hava eina nágreiniliga og fullgjørda heildarmynd av føroysku listasøguni. Hetta er eitt av aðalmálum Listasavnsins. Við einum grunni kundi Listasavnið havt munandi betri úrval av nýggjari føroysku listini, so gloppini ikki gerast ov stór.

### Útbygging av Listasavni Føroya

Tá ið Listasavnið var útbygt í 1993, fingu vit framsýningarhøli til eina fasta framsýning av tí besta av føroyskari list. Tó vísti tað seg skjótt, at neyðugt var eisini at brúka tey nýggju hølini til skiftandi framsýningar. Tað er sera ringt fyri listaverk at verða handfarin ofta, og serliga eru tað verkini eftir Mikines, sum eru viðbrekin.
Framsýningarhølið, sum er ætlað til skiftandi framsýningar, er ikki nøktandi og er alt ov lítið og illa hóskandi til tær margfaldu framsýningar, ið tørvur er á í einum nýmótans savni, eitt nú video-rúm til installatiónir, grafikk o.a..
Fyri at betra og økja um framsýningar- og goymsluhølini er kanningararbeiði farið í gongd, hvørjir útbyggingarmøguleikar eru, og hvussu ein møgulig útbygging kann fremjast.

## Starvsfólk

Í løtuni er fígging til 3 fulltíðarstørv. Tá talan er um fá størv, er sera umráðandi, at starvsfólkini eru lagalig (fleksibul) og før fyri at útinna fleiri ymsar uppgávur á savninum, eitt nú savnsarbeiði, at reka sølubúðina, at geva rundvísur í framsýningini, at dagføra heimasíðuna og at fáast við vanligar skrivstovuuppgávur.
Neyðugt er, at Listasavn Føroya hevur starvsfólk við fyrisitingarligum, list- og savnsfrøðiligum og námsfrøðiligum førleika.
Listfrøðiligu uppgávurnar verða fyribils loystar av einum list- og savnsfrøðiligum ráðgeva, ið skal veita íblástur, vera ígongdsetari og tryggja støði og menning á stovninum. Við framtíðini í huga kann tað vera ein fyrimunur, at møguleiki er fyri at nýta listfrøðingar á savninum í skiftandi tíðarskeiðum. Tað skapar menning og fjølbroytni til gagns fyri føroysku listini.

## Stuðul og fíggjarvánir

Stuðulin frá myndugleikum, grunnum og feløgum hevur stóran týdning fyri virksemið hjá LF, og tað hevur gjørt tað møguligt at fremja tiltøk, sum annars ikki vórðu gjørd.
Í hesum sambandi takkar LF Mentamálaráðnum, Tórshavnar Kommunu, Listafelagi Føroya, Nordisk Kulturfond, Den Konglige Norske Ambassade, Letterstetiska, Føroya Sparikassa, Norðurlandahúsinum og Mentanargrunni Landsins.

# Virkisgrundarlag og endamál

## Navnið á savninum

LISTASAVN FØROYA

## Adressa, telefonnummar o.t.

Gundadalsvegur 9, Postboks 1141, FO 110 Tórshavn
Tlf.: +298 313579. Fax: +298 316679
E-mail: info@art.fo
Heimasíða: www.art.fo

## Savnsbygnaður

Listasavn Føroya er sjálvsognarstovnur, sum er stovnaður av Listafelagi Føroya og Føroya Listasavni í 1989, sum fevnir um framsýningarhúsið "Listaskálin", aðrar fastar ognir og savnið við føroyskari list.

## Endamálið hjá Listasavni Føroya

- at keypa og á annan hátt fáa til vegar savn við listaverkum, undir hesum mynd- og gagnlist og at skráseta og varðveita hetta savnið.
- at sýna fram føroyska myndlist við fastari framsýning í Listaskálanum og at skipa fyri skiftandi framsýningum av føroyskari og útlendskari list í Føroyum og uttanlands.
- at útvega yvirlit yvir føroyska list á øðrum hondum.
- at fáa til vegar bókasavn, sum lýsir føroyska list og menning hennara.
- at veita skúlum, feløgum og øðrum vegleiðing og hjálp at lýsa føroyska list.
- at virka fyri, at stovnurin fjølgar um virkismøguleikarnar hjá skapandi listini.
- Listasavn Føroya kann lata almennum stovnum o.t. listaverk í varðveitslu við treytum, sum stýrið ásetur.

## Samstarvsavtalur

Listasavnið hevur eitt sera neyvt samstarv við Listafelag Føroya, sum m.a. er stuðulsfelag hjá savninum, og sum á hvørjum ári fyrireikar Ólavsøkuframsýningina. Listasavnið hevur samstarv við Føroysk Myndlistafólk, sum m.a. fyrireika ta árligu "Várframsýningina".
Savnið samstarvar við Fælleskonserveringen (Vest) í Århus, tá tørvur er á konservering.
Avtala er gjørd við Føroya Landsbókasavn um at skráseta og røkja listabókasavnið á Listasavninum.

# Innsavning, keyp og gávur

## Listasavnið

Listasavn Føroya eigur u.l. 2000 listaverk (málningar, tekningar, vatnlitsmyndir, pastell, standmyndir, grafikk og steinprent). Hetta eru listaverk eftir føroysk listafólk ella listafólk við neyvum sambandi við Føroyar.

## Keypt, givin og latin í varðveitslu

## Keyp:

| **Listafólk:** | **Prísur:** |
|---|---|
| Edward Fuglø – Krákuting ................................ | 25.000 |
| Anna Katrina Højgaard – Fotomyndir .............. | 4.000 |
| Astrid Andreasen – Baby Boom ......................... | 17.500 |
| **Íalt** ........................................................................... | **46.500** |

## Donatión - gáva:

Arvingarnir eftir hjúnunum Peturi Dahl (føddur í 1914; deyður í 1980) og Petru Nellu Dahl (født í 1910; deyð í 2005) hava eftir ynski foreldranna latið fylgjandi verk teirra til Listasavn Føroya sum gávu:

William Gislander (1890-1937).
1. *Lundar*, uml. 1924. Olja.
22 x 24 (mynd), 33 x 34 (ramma, svørt).

Flora Heilmann (1872-1944).
2. *Mýrusóljur*, 1923. Olja.
22 x 31 (mynd), 33 x 41 (ramma, gull).

Christen Holm-Isaksen (1877-1935).
3. *Úr gomlu Havnini I (Gamla Bókasavnið).* Vatnlitir.
21 x 34 (mynd), 30 x 44 (ramma, svørt).

4. *Argir.* Vatnlitir.
36 x 24 (mynd), 46 x 34 (ramma, gull).

5. *Úr gomlu havnini II (Húsabrúgv ?).* Vatnlitir.
36 x 25 (mynd), 43 x 31 (ramma, gull).

Niels Kruse (1871-1953).
6. *Vestur um útferðina*, 1924. Olja.
64 x 46 (mynd), 79 x 61 (ramma, gull).

S. J. Mikines (1906-1973).
7. *Brim í Mykinesi – útsýni móti Vágoynni*, 1928. Olja.
38 x 26 (mynd), 49 x 36 (ramma, svørt við gullkanti).

Jógvan Waagstein (1879-1949).
8. *Hoyvíkin*, 1940. Olja.
73 x 51 (mynd), 86 x 65 (ramma, gull).

Listaverkini stava frá hjúnunum Jákupi Dahl, prósti, og hava hingið í próstagarðinum í Sandagerði.

William Gislander var svii, ið kom til Mykines summarið 1924 at mála landsløg og fuglar. Gislander var ikki tann stóri listamaðurin, men í eygunum á tí tá 18 ára gamla S.J. Mikines, sum umhugsaði at verða fiólleikari, var tað ein opinbering at síggja, hvussu ein málningur varð til. Mikines elti Gislander um alla oynna og royndi sjálvur at mála við litleivdunum, ið hann kundi kroysta burtur úr tupum, ið Gislander hevði tveitt frá sær. Hetta var m.a. orsøkin til, at Mikines fór undir at mála.
Myndin eftir Floru Heilmann er ikki bert vøkur og heimlig í sjálvari sær, nú umboðar hon eisini føroyskan tjóðskap, tí myndevnið er um mýrusóljur, ið herfyri vórðu kosnar sum tjóðarblóma Føroya.
Christen Holm-Isaksen (Kristin í Geil), ið var bæði fotografur, rithøvundur, yrkjari, blaðstjóri o.m.a., málaði landsløg runt um landið, m.a. hesar tríggjar vatnlitsmyndirnar úr gomlu Havnini og av Argjum.
Myndin eftir Niels Kruse, *Vestur um útferðina*, hevur nøkur hol á bæði myndini sjálvari og rammuna. Hesi hol stava frá granatsplintum eftir torpedo, ið fuku inn á prestagarðin undir Øðrum Veraldarbardaga.
Myndin av brimi í Mykines málaði Mikines sum bert 21-22 ára gamal, og vísir hann sostatt longu tá á kærleika sín til føðioyggina sum ævigt umgyrdað av brimi. Hóast brimið er hendan myndin lívgandi, tí dagsljósið skínur sum ongantíð áður. Hetta myndevnið við briminum gongur aftur seinni í yrkisleið hansara, men tá er tað ógvusligari og daprari, tí dagsljósið boyggir seg fyri myrkrinum, og samsvarar tað við ta vanlagnu, at mong, m.a. familja og bygdafólk Mikinesar, lótu lív av herviligu tuberklunum ella sjólótust.
Saman við Christen Holm-Isaksen og Niels Kruse er Jógvan Waagstein (ið eisini var tónleikari, organistur, kórleiðari, songlærari og tónasmiður) triði listamálarin, ið føddur er í 1870-árunum, og sum málaði mangar landslag-myndir. Innlit í málningalist fekk hann m.a. frá Floru Heilmann. Ljósið í fleiri av málningum Waagsteins fær tað vakra og serstaka fram í føroyska landslagnum við íblástri frá impressionismuni. Í hesum føri er tað heystið, ið verður drigið fram við reyð-brúnligum og bleikgrønum litum. Myndin verður ikki minni áhugaverd, tá ið hugsað verður um, at Waagstein eisini hevur málað aðrar myndir úr Hoyvíkini, men við øðrum litum, t.d. myndin *Í Hoyvík* frá 1917.

---

**Gáva úr búnum eftir Max Sørensen, professara cand.jur. (1913-1981) og Ellen Sørensen, cand.jur., (1909-2005) Tretommervej 21, 8240 Risskov Cpr. 230709-0166.**

Max Sørensen arbeiddi sum dómari við altjóða dómstólin í Haag við viðgerðini av kontinentalmarkinum í Norðsjónum og eisini tí føroyska. Max var ein føroyavinur.

Gávan er ein standmynd eftir:

**Janusi Kamban**
"Fisker"

# Savnið

## Útlánt listaverk

Til almennu stovnarnar, sum nevndir eru niðanfyri, hava vit lænt út nøkur av okkara listaverkum:

| | |
|---|---|
| Almannaráðið | 25 |
| Arbeiðsloysisskipanina | 6 |
| Bileftirlit Føroya | 5 |
| Danmarkar | 16 |
| Deildina fyri Arbeiðs- og Almanna Heilsu | 4 |
| Familju- og Heilsumálaráðið | 21 |
| Ferðaráð Føroya | 2 |
| Fíggjarmálaráðið | 23 |
| Fiskimálaráðið | 32 |
| Fiskirannsóknarstovuna | 5 |
| Føroya Fólkaháskúla | 1 |
| Føroya Fornminnisavn | 2 |
| Føroya Gjaldstovu | 5 |
| Føroya Kærustovn | 11 |
| Føroya Landfúta | 3 |
| Føroya Landsskjalasavn | 6 |
| Føroysku Sendistovuna í Keypmannahavn | 3 |
| Fróðskaparsetur Føroya | 1 |
| Gamla Apotekið / Løgtingsskrivstovuna | 8 |
| Granskingarráðið | 6 |
| Hvíldarheimið Naina | 10 |
| Landsbanki Føroya | 17 |
| Landsgrannskoðaran | 7 |
| Landssjúkrahúsið (Røntgendeildina) | 14 |
| Landsverkfrøðingin | 5 |
| Løgtingsskrivstovuna | 27 |
| Menningarstovuna | 5 |
| Mentamálaráðið | 6 |
| Oljumálaráðið | 8 |
| Postverk Føroya | 6 |
| Sjónvarp Føroya | 8 |
| Sorinskrivaran | 2 |
| Strandfaraskip Landsins | 1 |
| Studentaskúlan & HF-Skeiðið í Eysturoy | 4 |
| Tinganes | 63 |
| Tórshavnar Býráð | 3 |
| Tryggingarfelagið | 4 |
| Vinnuframagrunnin | 2 |

# Varðveiting og skráseting

## Skráseting
Arbeiðið at skráseta egin listaverk á teldutøku skrásetingarskipanini er komið væl ávegis og heldur áfram.

## Konservering
Fælleskonservering í Århus er samstarvsfelagi okkara í konserveringsmálum og í ár eru fylgjandi verk av S. J-Mikinesi konserverað.

- Í Mykines bygd, regn 1934, 57 x 65 cm
- Undirlýsi 1938, 57 x 74 cm
- Fólk við havið 1944, 89 x 96 cm
- Grindadráp 1942, 176 x 233 cm
- Morgunsól 1946, 61 x 78 cm
- Súgur við lendingina 1952, 100 x 125 cm
- Norðan 1957, 100 x 155 cm
- Kumlagrynnan brýtur 1959, 102 x 128 cm
- Á deyðastrá 1933, 20 x 26 cm
- Mykineskona 1934, 54 x 42 cm
- Morgun 1939, 100 x 135 cm
- Skipini fara 1937-38, 113 x 143 cm
- Dansur 1944, 144 x 194 cm
- Kvøld í Mykinesi 1950, 80 x 89 cm
- Postbáturin 1955, 110 x 150 cm
- Vetrarmorgun 1958, 105 x 120 cm
- Á deyðastrá 1933, 20 x 26 cm
- Fyri jarðarferð 1935, 187,2 x 228,7 cm
- Eftir jarðarferð 235 x 175 cm
- Grindadráp 1960, 171 x 206 cm

# Kunning

## Fasta framsýningin

## Upplatingartíðir – Opening hours

**1. mai - 31. august**
Týsdag / Tuesday – Fríggjadag / Friday kl. 11 – 16
Leygardag / Saturday – Sunnudag / Sunday kl. 14 – 17
Mánadag stongt – Monday closed

---

**Upplatingartíðir – Opening hours**
**1. september – 30. apríl**
Týsdag / Tuesday – Sunnudag / Sunday kl. 14 – 16
Mánadag stongt – Monday closed

Savnið er opið umleið 1300 tímar árliga.

## Skiftandi framsýningar

**14. januar - 28. februar 2005 - Territorielle Udsagn**
Birgit Johnsen og Hanne Nielsen videoinstallation/projekt - framsýnt Esbjerg Kunstmuseum 2003
Fyrsta framsýningin í árinum snúði seg um seks kvinnur, ið allar hvør sær fortaldu um nakrar hendingar, tær hava upplivað. Hetta vóru upplivingar, ið hvør einstøk kvinna fortaldi um í einum rúmi fyri seg, og somu upplivingar vórðu fortaldar fýra ferðir, meðan filmað varð frá ymsum síðum. Dentur varð skiftivís lagdur á form og innihald, og skift varð eisini millum frásagnirnar hjá ymsu kvinnunum. Frásagnirnar av somu uppliving vóru av tí sama ongantíð eins. Til videoinstallatiónina vórðu tveir stórskíggjar nýttir, harav tann eini var forskotin í mun til hin. Hetta var fyri at geva filminum eina eyka dýpd, og einki frásøgufólk var nakrantíð einsamalt. Filmurin varðaði í eini 50 minuttir. Harumframt vóru tveir aðrir stuttir filmar á ovastu hædd (balkongini) í gamla sali.

**4. - 28. mars 2005 - Várframsýningin**
Skipað av Føroyskum Myndlistafólkum
Árliga Várframsýningin - sum er ein dømd framsýning, har ein vald trímanna dómsnevnd av listafólkum tekur kritiska støðu til hvørt einstakt verk - var sum vant hildin. Við á framsýningini vóru Edward Fuglø, Ingun Hansen, Anna Katrina Højgaard, Oggi Lamhauge, Randi Martin, Marita Nattestad, Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen, Hans Pauli Olsen, Bárður Oskarsson, Eirikur Poulsen, Guðrið Poulsen, Jóna Rasmussen, Ingálvur av Reyni, Ásla Rannvá Svensson, Kári Svensson, Arnold Vegghamar, Ole Wich. Á framsýningini vóru oljumálningar, høgglist úr bronsu og granitti, grafikkur, leirlist, akrýlmálningar, fotomyndir, vatnlitsmyndir og glaslist.

**1. april - 2. maj 2005 - Maritim kontekst**
Bjørn Kromann-Andersen, Marianne Thingholm og Ralf Mabillon.
Henda framsýningin var í trimum, býtt sundur eftir teimum trimum listafólkunum: Bjørn Kromann-Andersen sýndi fram høgglist, Marianne Thingholm handverkslist og Ralf Mabillon oljumálningar. Temað í framsýningini var alt, ið hevði við hav at gera, eisini tað umhvørvisliga og ídnaðarliga, og hetta kundi setast í samband við fiskivinnutjóðina Føroyar.

**6. - 31. maj 2005 - Reflexer från Åland**
Guy Frisk, Kjell Ekstrõm, Jonas Wilén, Lill-Anne Kull, Keathy Ericsson-Jourdan, Isa Hällstrõm, Monique Lundberg, Nanna Sjõstrõm
8 álendingar høvdu felagsframsýning við alskyns málningum og gagnslist við íblástri úr Álandi.

**3. juni - 24. juli 2005 - Summarframsýning**
15 føroysk listafólk.
Sum nakað nýtt var fyri fyrstu ferð skipað fyri summarframsýning í Listasavninum. Við á framsýningini vóru bæði kendir og minni kendir føroyingar við heldur lívsjáttandi myndum, ið skuldu sipa til summarið, sum nú er í hæddini.

**28. - 31 juli 2005 - Ólavsøkuframsýningin 2005**
Skipað av Listafelag Føroya
Árliga Ólavsøkuframsýningin var eisini sum vant hildin. Ein vald trímanna dómsnevnd metti um innkomnu verkini. Við á framsýningini vóru Jóhan Martin Christiansen, Tormóður Djurhuus, Janus á Húsagarði, Ingi Súni Jacobsen, Sólvá Jensen, Heðin Kambsdal, Karsten Larsen, Magnus Magnusen, Randi Martin, Jón Miðberg, Øssur Mohr, Marianna Mørkøre, Amariel Norðoy, Vígdis Petersen, Eirkur Poulsen, Jóna Rasmussen, Pól Skarðenni, Kári Svensson, Arnold Vegghamar og tónleikabólkurin 200 saman við Sámali Blak. Á framsýningini vóru oljumálningar, akrýlmálningar, tekningar, grafikkur, høgglist úr basalti og bronsu, fotomyndir, videoinstallatión og blandað tøkni.

**5. august - 30. oktober 2005 - Listastevnan**
Framsýning í samstarvið við Listastevnuna við Kjell Nupen úr Noreg. *Les meir um listamannin her*..
Í sambandi við Listastevnuna var tann víðagitni norski listamálarin boðin at sýna fram. Við á framsýningini vóru fleiri stórir oljumálningar, steinprent og tvær glasmyndir. Myndirnar vóru hugleiðandi við denti á virðið í tí einstaka litinum. Millum annað var tann nógv umrøddi "Nupen-blái"-liturin at síggja, ið listamaðurin fann fram til við at blanda 40 ymsar bláar litir saman. Eisini var ein DVD-filmur at síggja, har Nupen prýddi kirkjuna í Kristiansand við glaslist.

**9. september - 30. oktober 2005 - Edvard Munch**
Smertens Blomst. *Meira sæst á heimasíðuni hjá Munch-museet í Oslo, Noreg*
Framsýningin við heimskenda norðmanninum er tann dýrasta og virðismiklasta, ið Listasavnið nakrantíð hevur skipað fyri. Við vóru tveir oljumálningar, tríggjar skitsur (m.a. av Skrígginum) og 45 steinprent (m.a. av Madonnu, Vampýrinum og Tregans blómu). Heitið á framsýningini sipar til tann tvídrátt, sum eyðkendi lív og hugsan Munchs. Einans gjøgnum líðing og trega kundi listin av sonnum koma fram. Og í lívinum var deyðin og í deyðanum lívið. Tá ið S. J-Mikines var nógv ávirkaður av Munch og eisini upplivdi mong av sínum nærmastu doyggja á ungum árum, var tað hóskandi, at fleiri Mikines-myndir enn vanligt hingu uppi í føstu framsýningini so vitjandi fingu høvi til at samanbera listina og temað hjá hesum báðum listamonnunum.

**4. november – 18. desember 2005 - Góðbitar í listasavninum undan jólunum**
Listasavn Føroya bjóðar til framsýningina Dokumentatión Nútíðarlist.
Framsýningin vísir eina breiða veiftru av list frá Janus Kamban, Frimod Joensen og Frits Johannesen til Sigrun Gunnarsdóttir Niclassen, Edward Fuglø, Bárður Oskarsson, Hansina Iversen, Rannvá Kunoy og fleiri av okkara yngru listafólkum, sum Listasavn Føroya og Listafelagið hava keypt inn tey seinastu árini. Fleiri verk hava ikki verið víst í Listasavninum áður.
Framsýningin vísir breidd og margfeldi í føroyskari myndlist, og vit vóna at bæði einstaklingar og skúlaflokkar koma at vitja listasavnið nú upp undir jól fyri at síggja eina øðrvísi presentatión av føroyskari myndlist, sum vísir, at okkara listafólk hava nógv annað enn bara landslagið uppá hjartað.

## Vitjandi, rundvísingar og annað kunnandi virksemi

Tað hava verið 15.622 vitjandi; av hesum eru skúlar o.t. um 4.875 vitjandi.

Nógvar rundvísingar hava verið fyri felagsskapir, ferðafólkabólkar, skúlar, útlendskar gestir hjá landsstýrinum og løgtinginum og øðrum, bæði í vanligu upplatingartíðini og eisini fyri og eftir vanliga upplatingartíð.

# Bygnaður, leiðsla og starvsfólk

## Stýrið

Savnið hevur eitt stýri við 4 limum.
Mentamálaráðharrin velur ein lim, sum er formaður, og Tórshavnar Kommuna, Listafelag Føroya og Føroysk Myndlistafólk velja hvør sín lim. Fyri hvønn limin verður samstundis valdur ein tiltakslimur. Nevndin verður vald fyri eitt 4-ára skeið. Valskeiðið gongur frá 1. apríl til 31. mars eftir kommunuval.
Stýrið velur varaformann. Fær formaðurin forfall, tekur varaformaðurin formanssætið.

Niðanfyri vórðu vald í stýrið fyri eitt 4 ára skeið frá 1. apríl 2005 til 31. mars 2009.

| | |
|---|---|
| Formaður: | Jágvan Páll Lassen, valdur av Mentamálaráðharranum - Einar Waag, varalimur |
| Nevndarlimur: | Hildur Eyðunsdóttir, vald av Tórshavnar Kommunu – Katrin Dahl Jacobsen, varalimur. |
| Nevndarlimur: | Árni Winther, valdur av Listafelagi Føroya – Julianna Klett, varalimur |
| Nevndarlimur: | Sigrun Gunnarsdóttir Niclassen, vald av Føroysk Myndlistafólk – Astri Luihn, varalimur |

## Leiðslan

Helgi Fossádal er settur sum savnsleiðari frá 1. mars 2005 í 5 ár.

## Leys hjálparfólk

Eftiransingarfólk: Helga Nattestad, Mortan Ólavson Vang

# Fígging og roknskapur

Listasavn Føroya verður rikið við studningi á løgtingsfíggjarlógini, Tórshavnar Kommunu og kann eisini taka ímóti øðrum stuðli, veitingum og gávum. Harafturat kunnu takast atgongu- og leigugjøld, kantinurakstur og søla av lutum og øðrum, sum hava samband við virki savnsins.

## Rakstrarroknskapur pr. 31. desember 2005

**Sjálvsognarparturin**

| | | 2005 | *(t.kr.)* *2004* |
|---|---|---|---|
| **Mentanartiltøk:** | | | |
| Atgongugjald | | 193.662 | *149* |
| Myndasøla | | 113.983 | *246* |
| Framsýningarútreiðslur | | -388.122 | *-113* |
| | | **-80.477** | ***282*** |
| **Avgreiðsla, móttøka:** | | | |
| Søla | | 228.347 | *252* |
| Keyp | | -45.754 | *-128* |
| Goymslubroyting | | 0 | *-41* |
| | | **182.593** | ***83*** |
| **Aðrar inntøkur:** | | | |
| Stuðul | 1 | 380.000 | *380* |
| Leiguinntøkur frá grafiska verkstaðnum og leiðara verkstaðsins | | 48.000 | *48* |
| Leiguinntøkur, grannahúsini | | 107.700 | *98* |
| Leiguinntøkur málningar o.a. | 2 | 196.293 | *181* |
| | | **731.993** | ***707*** |
| Starvsfólkakostnaður | | **0** | ***-2*** |
| **Úrslit av aktivitetum v.m.** | | **834.109** | ***1.070*** |
| **Útreiðslur:** | | | |
| Listakeyp | | -46.500 | *-98* |
| Konservering | | -57.999 | *-224* |
| Viðlíkahald, reingerð v.m. | | -1.229 | *-11* |
| Tryggingarendurgjald fyri herverk og innbrot í 2004 | | 57.817 | *0* |
| Skrivstovuhald, porto v.m. | | -27.032 | *-26* |
| Keyp av smáamboðum | | -406 | *-6* |
| Ferðaútreiðslur og umboðan | | -48.314 | *-72* |
| Annað | | -65.742 | *-62* |
| | | **-189.405** | ***-499*** |
| **Úrslit áðrenn fíggjarligar postar** | | **644.704** | ***571*** |
| Rentuútreiðslur | | -206 | *0* |
| Rentuinntøkur | | 564 | *1* |
| | | **358** | ***1*** |
| **Ársúrslit** | | **645.062** | ***572*** |

**Stýrið mælir til, at ársúrslitið verður býtt soleiðis**:

| | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| At flyta til næsta ár | 10.062 | *-208* |
| At flyta til millumverandi við Føroya Gjaldstovu | 635.000 | *780* |
| | **645.062** | ***572*** |

# Fíggjarstøða pr 31. desember 2005

| AKTIV | | 2005 | *(t.kr.)* *2004* |
|---|---|---|---|
| Málningar | 3 | 15.649.975 | *15.603* |
| Innbúgv | | 295.354 | *295* |
| Listaskálin, 1994 | | 18.614.366 | *18.615* |
| | | **34.559.695** | ***34.513*** |
| Bygningur, matr. nr. 1265v, Tórshavn | | **899.800** | ***900*** |
| **STØÐISOGN ÍALT** | | **35.459.495** | ***35.413*** |
| Kassapeningur | | 2.655 | *2* |
| Postgiro | | 2.231 | *2* |
| Føroya Banki | | 405.542 | *609* |
| Føroya Sparikassi | | 85.294 | *75* |
| **Tøkur peningur íalt** | | **495.722** | ***688*** |
| **Goymsla** | | **200.000** | ***200*** |
| Skuldarar | | 283.356 | *84* |
| **Áogn íalt** | | **283.356** | ***84*** |
| **OGN Í UMFERÐ ÍALT** | | **979.078** | ***972*** |
| **AKTIV ÍALT** | | **36.438.573** | ***36.385*** |

**Veðseting:**

Matr. nr. 1265v, Tórshavn:

| | |
|---|---|
| Føroya Sparikassi | 641.978 |
| Føroya Sparikassi | 800.000 |
| | **1.441.978** |

## Fíggjarstøða pr. 31 desember 2005

| PASSIV | Nota | 2005 | (t.kr.) *2004* |
|---|---|---|---|
| Saldo primo ........ | | 35.288.461 | *35.258* |
| Keyp av listaverkum í árinum........ | | 46.500 | *98* |
| Føroya Gjaldstova, avdráttir ........ | | 136.325 | *140* |
| Flutt frá rakstri ........ | | 10.062 | *-208* |
| **Eginogn ultimo** ........ | | **35.481.348** | ***35.288*** |
| | | | |
| **Lán viðv. matr. nr. 1265v í Tórshavn:** | | | |
| Føroya Sparikassi 267.584.8 | | 94.256 | *170* |
| Føroya Sparikassi 281.933.5 | | 441.301 | *502* |
| **Lán íalt** | | **535.557** | ***672*** |
| | | | |
| Føroya Gjaldstova (ársúrslit) | 4 | 400.000 | *415* |
| Ognarar | | 900 | *9* |
| Skyldugt mvg | | 20.768 | *1* |
| Onnur skuld | | 0 | *0* |
| **Skuld íalt** | | **421.668** | ***425*** |
| | | | |
| **PASSIV ÍALT** | | **36.438.573** | ***36.385*** |

# Notur til ársroknskapin 2005

| | 2005 | (t.kr.) *2004* |
|---|---|---|
| **1. Stuðul** | | |
| **Framsýningar:** | | |
| Norðurlandahúsið | 20.000 | *25* |
| Tórshavnar Kommuna | 7.000 | *25* |
| Føroya Sparikassi | 10.000 | *25* |
| Mentunargrunnur landsins | 75.000 | *25* |
| **Konservering:** | | |
| Mentamálaráðið | 110.000 | *100* |
| Augustinusfonden | 0 | *80* |
| Beckettfonden | 0 | *50* |
| **Árligur stuðul:** | | |
| Tórshavnar býráð | 150.000 | *50* |
| **Annar stuðul:** | | |
| Mentamálaráðið – ferðastuðul | 8.000 | *0* |
| **Stuðul íalt** | **380.000** | ***380*** |
| **2. Leiguinntøkur málningar o.a.** | | |
| Leiga Skálin til tiltøk | 12.500 | *3* |
| Leiga til móttøkur o.l. | 27.558 | *13* |
| Leiga – List og málningar | 156.235 | *165* |
| **Leiguinntøkur íalt** | **196.293** | ***181*** |
| **3. Málningar** | | |
| Saldo primo | 15.603.475 | *15.505* |
| Keypt í árinum | 46.500 | *98* |
| **Saldo ultimo** | **15.649.975** | ***15.603*** |

**Keypt í árinum:**

| **Listafólk:** | **Prísur:** |
|---|---|
| Edward Fuglø – Krákuting | 25.000 |
| Anna Katrina Højgaard – Fotomyndir | 4.000 |
| Astrid Andreasen – Baby Boom | 17.500 |
| **Íalt** | **46.500** |

| | 2005 | *2004* |
|---|---|---|
| **4. Føroya Gjaldstova** | | |
| Saldo primo | 415.000 | *530* |
| Flutt úrslit | 635.000 | *780* |
| Goldið í árinum | -650.000 | *-895* |
| **Saldo ultimo** | **400.000** | ***415*** |

## Samanseting av tí almenna og sjálvseigandi ársroknskapinum 2005

| | Sjálvseigandi | Almennur | Samlað |
|---|---|---|---|
| **Mentunartiltøk:** | | | |
| Atgongugjald | 193.662 | 800 | 194.462 |
| Myndasøla | 113.983 | 0 | 113.983 |
| Framsýningarútreiðslur | -388.122 | -202.120 | -590.242 |
| | **-80.477** | **-201.320** | **-281.797** |
| **Avgreiðsla, móttøka:** | | | |
| Søla | 228.347 | 0 | 228.347 |
| Keyp | -45.754 | 0 | -45.754 |
| Goymslubroyting | 0 | 0 | 0 |
| | **182.593** | **0** | **182.593** |
| **Grafiskur verkstaður:** | | | |
| Leiguinntøkur grafiskur verkstaður | 48.000 | 0 | 48.000 |
| | **48.000** | **0** | **48.000** |
| **Úrslit av aktivitetum v.m.** | **150.116** | **-201.320** | **-51.204** |
| **Aðrar inntøkur:** | | | |
| Stuðul/Játtan | 380.000 | 2.009.852 | 2.389.852 |
| Leiguinntøkur grannahúsini | 107.700 | 0 | 107.700 |
| Leiguinntøkur list | 156.235 | 0 | 156.235 |
| Leiga til receptiónir | 27.558 | 0 | 27.558 |
| Leiga Skálan út til tiltøk | 12.500 | 0 | 12.500 |
| | **683.993** | **2.009.852** | **2.693.845** |
| **Fyrisitingarútreiðslur:** | | | |
| Fast lønt íroknað eftirløn | 0 | -1.035.352 | -1.035.352 |
| Tímalønt | 0 | -199.533 | -199.533 |
| Samsýningar, viðbøtur og arb.gjøld v.m. | 0 | -81.711 | -81.711 |
| El-útreiðslur | 0 | -93.841 | -93.841 |
| Hitaútreiðslur | 0 | -111.111 | -111.111 |
| Olja til maskinur o.a. | 0 | -107.989 | -107.989 |
| Telefon | 0 | -31.853 | -31.853 |
| Edv v.m. | 0 | -46.730 | -46.730 |
| Roknskaparhjálp, grannskoðan og onnur sakkøn hjálp | 0 | -65.735 | -65.735 |
| Trygging | 0 | -71.800 | -71.800 |
| Vaktartænasta | 0 | -26.000 | -26.000 |
| Viðlíkahald, reingerð v.m. | -1.229 | -192.016 | -193.245 |
| Tryggingarendurgjald fyri herverk og innbrot í 2004 | 57.817 | 0 | 57.817 |
| Skrivstovuhald, porto v.m. | -27.032 | -66.879 | -93.911 |
| Lýsingar og undirhald v.m. | 0 | -39.934 | -39.934 |
| Keyp av smáamboðum og innbúgv | -406 | -36.866 | -37.272 |
| Ferðaútreiðslur og umboðan | -48.314 | -39.269 | -87.583 |
| Annað | -65.742 | -23.913 | -89.655 |
| | **-84.906** | **-2.270.532** | **-2.355.438** |
| **Aðrar útreiðslur:** | | | |
| Listakeyp, konservering o.a. | -104.499 | 0 | -104.499 |
| | **-104.499** | **0** | **-104.499** |
| **Úrslit áðrenn fíggjarligar postar** | **644.704** | **-462.000** | **182.704** |
| Fíggjarligar inntøkur | 564 | 0 | 564 |
| Fíggjarligar útreiðslur | -206 | 0 | -206 |
| | **358** | **0** | **358** |
| **Úrslit** | **645.062** | **-462.000** | **183.062** |
| partur av úrsliti flutt frá sjálvseigandi til almenna uppgerð | -635.000 | 635.000 | |
| Lánsgjøld | 0 | -173.000 | |
| | 10.062 | 0 | |

Uppskot til ársfrágreiðingina er løgd fyri stýrið á Listasavni Føroya

Tórshavn, 31. 05  2006

**Helgi Fossádal**